Próvtøka og fótbóltur

Fólkaskúlin er í hesum døgum raktur av verkfalli, nú tri›i hvør lærari er r‡mdur til hús. Enn røkist einki fyri nakrari loysn, tí partarnir standa langt frá hvørjum ø›rum. Fyri næmingarnar hevur ta› ymiskan t‡dning, at verkfall er. Summi ganga framvegis í skúla størsta partin av tí›ini, me›an onnur hava nógvar frítímar.

Spurningurin er so, hvat er stuttligari, tá samanumkemur. Tey, sum ganga í skúla, fáa undirvísing í øllum teimum lærugreinunum, sum tey skulu til próvtøku í, og hóast tey ivaleyst kundu hugsa sær ta› frítí›ina, sum onnur fáa, so kunnu hesar vikurnar, sum verkfalli› var›ar, koma at hava stóran t‡dning fyri próvtøkuna í summar.

Í bla›num í dag hava vit samrø›u vi› ein av teimum ungu fótbóltsspælarunum í Føroyum, sum um nøkur ár helst fer at ver›a ein av profilunum í bestu deildini og kanska á landsli›num. Karstin Joensen hevur spælt á øllum ungdómslandsli›unum hjá FSF, og nú hevur hann fingi› sáttmála vi› barndómsfelagi› KÍ. Karstin er nærlagdur og venur nógv fyri stø›ugt at taka seg fram sum málma›ur. Hann hoyrir til 1. li›shópin hjá KÍ, men ungi málverjin má helst bí›a eina tí› afturat, á›renn hann rættiliga fær kjansin millum stólparnar hjá meistarali›num.

Karstin er bara ein av teimum ungu spælarunum, sum rættiliga eru á veg í føroyskum fótbólti. Í Klaksvíkskappingini, sum var í vikuskiftini, høvdu venjararnir hjá f‡ra teimum bestu li›unum í landinum (ta› vóru tey í fjør í hvussu so er) givi› ungum og óroyndum spælarum kjansin á li›num. Serliga HB og B36 hava seinnu árini gjørt nógv vi› at fáa spælarar úr ø›rum feløgum, men nú er líkt til, at tey fara at satsa meira uppá ungar spælarar, sum tey sjálvi hava uppalt. KÍ og GÍ líta í stóran mun á egnar spælarar, me›an spælarar uttanífrá ver›ur heinta›ir til felagi› fyri at styrkja ávís pláss á li›num.

Ta› gongur ofta ógvusliga fyri seg í bretskum tónleiki, ikki bara á pallinum, men eisini uttanfyri. Kendir bólkar plaga at trívast væl, tá teir sleppa at gera seg inn á hvønn annan í fjølmi›lunum, og solei›is er framvegis. Stórsnúta›i popparin Robbie Williams hevur bjó›a› einum ø›rum framúr komponisti, Liam Gallagher úr Oasis, av, í einum boksidysti, og hetta hevur fingi› nógva umrø›u. Solei›is var eisini, tá Oasis og Blur plagdu at havast at hvørjum ø›rum, og alt botnar í einum PR-stunti, har ta› sn‡r seg um at tryggja sær umrø›u av tí undirhaldandi slagnum. Og ta› er júst ta›, ta› er, undirhaldandi...

Send inn og vinn

3 arin

letur eina fløgu um vikuna til teg, sum hevur besta innslagi› í Yngd.

Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd“. Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3‘aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

Tí›indabla›i› Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller

Bla›stjórn:
Fró›i Løkságar›

Uppseting:
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Les Yngd í Sosialinum hvønn mikudag

Girl Power

Girl Power

Geri Halliwell royndi at provokera, men ta› vóru Tom Jones, Macy Gray, Robbie Williams og Travis, i› vóru teir stóru sigursharrarnir, tá bretski tónleikaídna›urin næstseinasta fríggakvøld læt tær árligu Brit Award vir›islønirnar.

Earls Court í London, var karmur um ta› árligu Brit Award vir›islønarhandanina næstseinasta fríggjakvøld. Ein hópur av teimum kendastu nøvnunum á enska tónleikapallinum vóru møtt upp til hesa hátí›arløtuna, antin fyri at vera hei›ra›i ella hoyrd, og onkur helst eisini bara fyri at vera sædd. Sum vanligt er til tílík kvøld, so hendur eitt og anna› spennandi, Brit Awards 2000 var í so máta einki undantak.

Eitt av hæddarpunktunum á kvøldinum var tá tann nú 59 ára gamli rokkabbin Tom Jones var róptur upp á pallin at taka ímóti vir›islønini fyri at vera besti enski sangari. Tom Jones vann henda hei›ur fyri nøsini á so frægum monnum sum Sting, David Bowie og Van Morrison. Tom Jones hevur seinasta ári› rættuliga gjørt um seg vi› eini útgávu nevnd Reload, har hann syngur saman vi› einum hópi av kendum sangarum og bólkum. Sangurin Sexbomb sum er tikin av hesi útgávu hevur veri› rættuliga nógv at hoyrt her heima seinastu tí›ina.

Vir›islønin fyri besta bólk og bestu útgávu fóru til Travis sum vi› síni útgávu av The man who.... rættuliga hava sligi› sítt navn fast sum eitt av mest spennandi ensku nøvnunum í dag. Stílurin hjá Travis er rættuliga enskur, og kann nokk best l‡sast sum ein blanding av Oasis og Radiohead.

Eitt anna› navn i› eisini slapp at bera tvær av teimum nógv ynsktu Brit Award vir›islønunum heim vi› sær aftur, var amerikanska songkvinnan Macy Gray. Hon hevur vi› síni serligu rødd rættuliga vunni› seg fram seinasta ári›, og útgávan hjá henni sum ber heiti› Macy Gray On How Life Is er rættuliga væl dámt av ummælarum. Enska tónleikatí›arriti› Q magazine vóru tó ikki alt ov fittir tá teir royndu at siga lesarum sínum hvussu hon ljó›a›i. "Hon syngur sum hevur hon svølgt ein frosk" vóru or›ini hjá enska bla›manninum. Alt hetta for›a›i tó ikki henní í at strúka avsta› vi› vir›islønunum fyri besta alltjó›a sangara og besta n‡ggja alltjó›a navn.

Fyrrverandi Take That drongurin Robbie Williams hevur sí›ani hann r‡mdi úr Take That ikki ligi› á teirri lætu sí›uni. Eftir at hava veri› í vi›ger fyri rúsevnismisn‡stlu fekk hann rættuliga gongd á yrkislei›ina aftur. Tvær útgávur er ta› blivi› til higartil. Ta› var ein sangur av teirri seinnu sum gjørdu vart vi› seg til Brit Awards hesafer›. Lagi› "She's The One" streyk avsta› vi› tveimum vir›islønum, ávíkavist fyri bestu stakfløgu og besta videolag.

Outstanding Contribution To British Music, er heiti› á einari vir›isløn, sum ver›ur latin hvørt ár tá Brit Award vir›islønirnar vera handa›ar. Í ár vóru ta› Spice Girls, sum fingu henda hei›ur, sum fyrr er fallin nøvnum sum Fleetwood Mac og Eurythmics í lut. Stórur spenningur var hetta kvøldi› um tann fyrrverandi kryddara gentan Geri Halliwell fór at møta upp saman vi› gomlu vinkonunum. Men tey i› høvdu vóna hetta vóru øll skuffa›i. Í sta›in fyri trein hon pallin einsamøll. Hon var eitt av nøvnunum sum slapp at framføra eitt lag hetta kvøldi›. Framfør›slan hjá henni spældi ikki heilt stilligsliga av, tí at á pallinum hev›i hon eitt stórt skelti vi› áskriftini "Girl Powder" ein ni›urger› av slagor›unum hjá Spice Girls, "Girl Power".

Ta› var ikki bara Geri Halliwell sum hev›i hug at gera um seg hetta kvøldi›, eisini Robbie Williams n‡tti høvi at øsa Liam Gallagher úr Oasis, tá Robbie Williams í a›rari takkarrø›uni hjá sær, stilla›i seg at herma eftir Liam Gallagher. Ta› ljó›ar eisini, at á veitsluni sum var hildin aftana hei›urlønarhandanina mundu hesir somu fari› til hendurs.

Ógvusligasta hendingin sum fór fram á pallinum hetta kvøldi› var tá gamli libertinarin og guitaristurin í Rolling Stones, Ron Wood, fór til hendurs vi› ein av plátuvendarunum. Eftir at hava keglast eina løtu vi› plátuvendararan enda›i ta› vi› at Ron Wood stoytti glasi› hann hev›i í hondini beint í høvdi› á plátuvendaranum. Endin var at trygdarvørar komu upp í leikin og drógu plátuvendaran av pallinum á›renn naka› álvarasamari hendi. Sig so at bretar altí› eru so ke›iligir.

Girl Power